Fiskidagar elvt til rumbul í samgonguni

Seinnapartin í gjár gjørdust samgongulimir so ósamdir um lógaruppskotið um fiskidagar, at tingfundurin varð slitin. Jákup Joensen, sambandstingmaður, fer at atkvøða ímóti uppskotinum hjá John Petersen



Jákup Joensen, tingmaður, atkvøður ímóti lógaruppskotinum um fiskidagar

ÁKI BERTHOLDSEN

Rættiligt rumbul stóðst í tinginum í gjár. Lógaruppskotið hjá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, og einum meiriluta í Vinnunevndini, um fiskidagar, var til 2. viðgerð.

Sum fundurin leið, gjørdust alt fleiri samgongulimir ivasamir um uppskotið. Serliga er tað ætlanin at gera fiskidagarnar umsetiligar í 15 ár, sum fær tinglimir at ivast.

Startskotið til rumblið byrjaði í gjáramorgunin, tá Jákup Joensen legði fram broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins. Jákup Joensen er beinleiðis ímóti, at umsetiligheitin skal vara í 15 ár.

Broytingaruppskotið hjá Jákupi Joensen áleggur eisini, at ávís gýtingarøki verða friðað. Í viðmerkingunum sigur Jákup Joensen, at hann hevur ikki álit á, at John Petersen, landsstýrismaður, fer at gera tær friðingar, sum skulu til, og sum ætlanir hava verið um.

– Higartil hevur John Petersen ongan vilja víst, sigur Jákup Joensen, samgongufelagi hjá John Petersen.

Pauli Ellefsen og Ernst Hansen ivasamir

Eisini tveir aðrir samgongulimir, Pauli Ellefsen, sum í løtuni er á tingi fyri Bjørn á Heygum, og Ernst Hansen, eru sera ivasamur um fiskidagauppskotið.

Undir viðgerðini kom hópin av spurningum upp. Millum annað varð spurt, hvat hendir teimum, sum hava keypt ávíst fiskidagatal, um samtykt verður at skerja samlaða fiskidagatalið.

– Fær landskassin so endurgjaldskrav, varð spurt.

Fundurin niðurlagdur

Klokkan 15.10 seinnapartin í gjár stóð so hart á, at avgjørt varð at slíta tingfundin, so samgongutropparnir kundu savnast.

Stutt áðrenn hetta løgdu teir tríggir tingmenninir, Atli Hansen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen, upp aftur eitt broytingaruppskot fyri tingið. Tað uppskotið áleggur teimum, ið umseta (hava fingið tillutað) fiskidagar, at fylgja teimum broytingum, ið møguliga verða framdar seinni.

Sum skilst er endamálið við tí broytingaruppskotinum at byrgja fyri endurgjaldskravi móti landskassanum.

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar færttis, at teir tríggir, Álvur Zachariasen, Atli Hansen og Óli Jacobsen skjóta upp at lækkar umsetiligheitina úr 15 árum niður í 10 ár.

KVØLDSKRÁIN Á HANDILSSKÚLANUM
Skúlaárið 1997/98

INNSKRIVINGARSEÐIL

Ættarnavn:	Føðingardagur:
Fornavn:	Starv/arbeiðsplass
Bústaður:	Tlf. arbeiðsplass:
Postnr./bygd býur:	Tlf. heima

FHS- STAKROYNDIR ☐ HH- STAKROYNDIR ☐ MERKONOM ☐ ALMENN FYRISITING ☐

			Mánadag				Týsdagur				Mikudag			
Undirvisingin fer fram í teimum tíðarbilum har teigarnir eru ljósir			17.45 18.30	18.30 19.15	19.30 20.15	20.15 21.00	17.45 18.30	18.30 19.15	19.30 20.15	20.15 21.00	17.45 18.30	18.30 19.15	19.30 20.15	20.15 21.00
	FHS- LÆRUGREINIR	X í rútin												
01	Bú- og Roknskapur C				Undirvising								Undirvising	
02	Informatiónsviðgerð C		Undirvising								Undirvising			
03	Enskt II						Undirvising							
04	Enskt C						Undirvising							
06	Dekoratión						Undirvising							
07	Marknaðarlæra C (sala og tænasta)		Undirvising											
	HH- LÆRUGREINIR													
21	Roknskaparlæra/ virkisbúskapur B		Undirvising								Undirvising			
22	Støddfræði B		Undirvising								Undirvising			
23	Støddfræði A		Dagskúlalærugrein											
	MERKONOM													
	GRUNDLÆRUGREINIR:													
30	Virkisbúskapur		Undirvising											
31	Virkisfyriskipan				Undirvising									
32	Leiðsla og samstarv										Undirvising			
	LINJULÆRUGREINIR:													
33	Starvsfólkafyrisiting												Undirvising	
34	Starvsfólkamenning				Undirvising									
35	KT í virkjum (informatikk)		Undirvising											
36	Organisatión og strategi												Undirvising	
37	Innanvirkis roknskapur												Undirvising	
38	Ársroknskapur										Undirvising			
39	Samfelagsbúskapur				Undirvising									
40	Skattarættur I		Ikki ásett nær tímarnir liggja. Verða helst millum kl. 10.00 og 16.00 (2 skúlatímar um vikuna)											
	ALMENN FYRISITING:													
41	Fyriskipan og samskifti						15.30 - 17.00							
42	Ríkisrættur						17.15 - 18.45							

Skal verða skúlanum í hendi innan 8. august 1997

_____ _____

undirskrift dagur

FØROYA HANDILSSKÚLI - Marknagilsvegur 77 - Postbox 177 - 110 Tórshavn - Telefon 17177 - Telefax 13374

Føroya Handilsskúli, Tórshavn, er vegna summarfrí stongdur frá 7. juli til 4. august 1997